LM-065/2023

FYLGISKJAL 2

KRINGVARP FØROYA

Til Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 11. desember 2023
Tygara ref.: TVR/AJ
Máltal: 23/19640

Hoyringssvar frá Kringvarpi Føroya til

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp
(Árlig prístalsjavning, lægri kringvarpsgjald fyri smærri virki, stovnar v.m. og broyting í kringvarpsgjaldinum fyri likamligar persónar)

Kringvarp Føroya (KVF) fegnast um, at Landsstýrið nú – smb. samgonnguskjalinum – tekur stig til at styrkja KVF. KVF tekur yvirskipað undir við uppskotinum hjá Almanna- og mentamálaráðnum (AMMR) um at hækka kringvarpsgjaldið fyri likamligar persónar og at prístalsjavna gjaldið. Søgan hevur óreingiliga víst okkum, at einasta haldgóða loysnin at tálma avleiðingunum av prís- og lønarvøkstrinum er júst ein prístalsjavning.

Lógaruppskotið eigur tó eisini í størri mun at leggja upp fyri haldførinum í inntøkugrundarlagnum hjá Kringvarpi Føroya.

Okkara tilmæli standa á s.5. Hesi byggja á royndirnar frá søguligu gongdini, viðmerkingarnar til núverandi uppskot og á eina greining av haldførinum av inntøkugrundarlagnum hjá KVF.

Søguliga gongdin

Frá 1. januar 2016 var skipanin við at innkrevja kringvarpsgjaldið broytt m.a. við tí endamáli: *"at tryggja eitt haldgott rakstrargrundarlag undir almennu public service-skyldunum hjá Kringvarpi Føroya"*.

Ein fyritreyt fyri, at broytingin í skipanini skuldi eydnast til fulnar, var, at kringvarpsgjaldið bleiv prístalsjavnað. Hetta skuldi gerast á hvørjum ári við tveimum prosentum av gjaldinum undanfarna ár. Javningin var beinleiðis tilskilað í lógaruppskotinum og skuldi vera galdandi fyri likamligar persónar, virki og almennar stovnar.

KRINGVARP FØROYA

Hendan fyritreytin fall tó burtur. Undir viðgerðini av lógaruppskotinum í 2015 var ásetingin um prístalsjavningina strikað við teirri grundgeving, at: *"Politisk undirtøka er ikki fyri verandi javning í upprunauppskotinum, men tó er politisk semja um, at kringvarpsgjaldið skal javnast sambært einum almennum javningarfrymli, tá ið hesin verður veruleiki. Hetta krevur tó lógarbroyting. Tað er týdningarmikið, at ein javningarskipan verður gjørd fyri at tryggja ímóti, at Kringvarp Føroya við árunum missir inntøku sum avleiðing av prís- og lønarvøkstri í samfelagnum."*

Ásannast má tíverri, at politiska semjan um tað neyðuga í, at kringvarpsgjaldið skuldi javnast, ikki rakk longur enn til álitið hjá meirilutanum í mentanarnevndini. Javningin gjørdist tí ongantíð veruleiki. Hinvegin gjørdist tað veruleiki, at KvF við árunum kom at missa inntøku sum avleiðing av prís- og lønarvøkstri – júst sum tað í desember 2015 varð ávarað um í álitinum frá meirilutanum í mentanarnevndini.

Avleiðingin av vantandi prístalsjavningini er eyðsýnd. Í dag ber til at staðfesta, at var kringvarpsgjaldið hjá likamligum persónum prístalsjavnað við tveimum prosentum á hvørjum ári frá 2017, so skuldu tey 24-66 ára gomlu goldið 175,75 kr. um mánaðin í 2024, meðan pensjónistar skuldu goldið 58,58 kr. um mánaðin. Um hetta var veruleiki, so hevði KVF fingið 9,7 mió.kr. meira í kringvarpsgjaldi frá persónum í 2024. Fyriliggjandi uppskot fer at geva umleið 5,8 mió.kr. í meirinntøkum frá persónum. **Hetta er umleið 3,9 mió.kr. minni enn ætlanin í 2015, tá ið politiska skipanin vildi tryggja KVF eitt haldgott rakstargrundarlag, legði upp til.**

Verður sama roknistykki gjørt fyri virki og stovnar, so hevði KVF fingið 1,9 mió.kr. meira í kringvarpsgjaldi frá virkjum og stovnum í 2024. Fyriliggjandi uppskot fer at geva umleið 0,5 mió.kr. *minni* frá virkjum og stovnum, ella **umleið 2,4 mió.kr. minni enn ætlanin í 2015, tá ið politiska skipanin vildi tryggja KVF eitt haldgott rakstargrundarlag, legði upp til.**

Upphæddir í mió. kr.	**Um ætlanin í 2015 hevði verið fullførd**	**Um fyriliggjandi lógaruppskot verður samtykt**	**Munur (meirinntøka av ætlanini í 2015)**
Meirinntøka til KvF í 2024 – frá persónum	9,7	5,8	3,9
Meirinntøka til KvF í 2024 – frá virkjum og stovnum	1,9	-0,5	2,4
Meirinntøka til KvF í 2024 – tilsamans	**11,6**	**5,3**	**6,3**

Treyðugt so, allur bati bøtir, og KVF fegnast um stigið hjá landsstýrinum. Veruleikin er tó tann, at **við fyriliggjandi lógaruppskoti verður ein roknaður inntøkumissur í 2024 upp á 11,6 mió.kr. bert "kompenseraður" við 5,3 mió.kr.** Forsømda prístalsjavningin frá og við 2017 verður tí enn ikki fingin hálvgum aftur á beint.

KRINGVARP FØROYA

Viðmerkingar til núverandi uppskot

Tað lá í kortunum í 2016, at kringvarpsgjaldið hjá øllum kringvarpsgjaldarum skuldi prístalsjavnast. Tann ætlanin er ikki í fyriliggjandi lógaruppskoti, har tað bert er kringvarpsgjaldið hjá persónum, sum verður prístalsjavnað. Fyri flestu virki og stovnar verður kringvarpsgjaldið framhaldandi óbroytt, og fyri smærru virki og stovnar verður gjaldið minni enn í dag.

KVF tekur undir við, at gjaldið fyri smærri virkjum og stovnar verður minni enn í dag. Tað er tó eitt politiskt val at minka kringvarpsgjaldið hjá ávísum bólkum og ikki lata hendan beinleiðis inntøkumissin verða uppvigaðan á annan hátt. Tá ið mann velur, at smærru virkini og stovnarnir skulu gjalda minni, so kundi mann samstundis valt, at tey størru skuldu gjalda eitt sindur meira.

Einaferð varð ásett, at ein skuldi ikki rinda kringvarpsgjald, fyrr enn ein var fyltur 24 ár. Tað er trupult at síggja haldgóðar grundgevingar fyri hesum. Kringvarpsgjaldið verður ofta mett at vera ein skattur, og tykist tað tí heldur marghátttligt, at gjaldsskyldan ikki tekur við fyrr enn frá 24 ára aldri. Til samanberingar kann nevnast, at øll, sum hava fylt 18 ár, skulu gjalda 175 kr. um mánaðin umframt 0,7% av skattskyldugu inntøkuni til Heilsutrygd, meðan øll, sum hava fylt 16 ár og hava A-inntøku, skulu gjalda til arbeiðsloysisskipanina og barsilsskipanina.

Tað ber sostatt til at fáa fleiri gjaldarar við at lækka aldursmarkið fyri, nær gjaldsskyldan hjá persónum tekur við. Hetta hevði verið ein munagoður bati. Útrokningar vísa, at sambandið millum ásett aldurmark og meirinntøkur í 2024 eru:

- aldursmarkið verður óbroytt 24 ár, meirinntøka til KvF í 2024 verður 5,8 mió.kr.
- aldursmarkið verður lækkað til 23 ár, meirinntøka til KvF í 2024 verður 7,1 mió.kr.
- aldursmarkið verður lækkað til 22 ár, meirinntøka til KvF í 2024 verður 8,2 mió.kr.
- aldursmarkið verður lækkað til 18 ár, meirinntøka til KvF í 2024 verður 14,1 mió.kr.

Útrokningarnar eru grundaðar á, at allar fortreytir annars í lógaruppskotinum verða óbroyttar.

Um politiska skipanin veruliga vil tryggja KvF eitt haldgott grundarlag, so eru fleiri møguleikar.


Avbjóðingar við haldførinum

Tað er ein sannroynd, at tað er ein avbjóðing at tryggja haldføri, tá fólkatalið er lítið. Fyribrigdið rópast "diseconomies of scale", og hetta er eisini galdandi fyri ein miðil sum KVF. Í stuttum merkir tað, at útreiðslurnar til kjarnutænastur og kritiskt undirstøðukervi lutfalsliga eru hægri enn hjá miðlum í størri londum.


Tí er átrokandi neyðugt at greina haldførið, tá eitt slíkt lógaruppskot verður lagt fram. Hyggja vit at fólkatalinum, so vísa framrokningar, at lutfallið millum kringvarpsgjaldarar, sum í dag rinda 150 kr. um mánaðin, og kringvarpsgjaldarar, sum í dag rinda 50 kr. um mánaðin, broytist munandi. Talvurnar niðanfyri vísa týðiliga hesa gongdina.

KRINGVARP FØROYA

Persónar 24-66 ár (í túsund)



Pensjónistar (í túsund)



Hendan gongdin í fólkatalinum minkar um haldførið í inntøkugrundarlagnum.

KRINGVARP FØROYA

Haldfarið verður eisini alla tíðina sett undir trýst, um prístalsjavningin verður ásett í lógini til at verða 2 % árliga. Sum øllum kunnugt eru bæði lønarvøkstur og prísvøkstur í løtuni oman fyri 2 % um árið. Tí fer ein prístalsjavning upp á 2 % av einum parti av inntøkunum, kringvarpsgjaldið frá persónum, ikki at bøta fyri verandi lønar- og prísvøkstri. Við øðrum orðum má staðfestast, at haldfarið versnar.

Framrokningar vísa sostatt, at KVF longu frá 2025 fær vaksandi hall.

Sostatt mæla vit til, at annar leistur verður brúktur til prístalsjavningarnar. Tað kundi t.d. verið leisturin, sum verður brúktur til at javna almannaveitingar smb. Løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018.

Samanumtøka

Tað er ikki á hvørjum ári, at broytingar verða gjørdar í kringvarpslógini, og at inntøkugrundarlagið hjá KVF verður endurskoðað. Tí er tað sera umráðandi at gera hetta skynsamt og rætt.

Frammanundan at skipanin við kringvarpsgjaldinum var broytt frá 2016, hevði kringvarpsgjaldið verið óbroytt øll árini frá 2004-2015. Tað sigur seg sjálvt, at tað hevur verið ein álvarslig niðurlaging av stovninum, og øllum kunnugt vóru sparitiltøk við uppsøgnum av starvsfólkum javnan framd hesi árini. Framdu broytingarnar í 2016 skuldu helst rætta nakað upp upp á hesa keðiligu gongdina, men við tað, at ætlaða prístalsjavningin varð slept, gjørdist úrslitið ein framhaldandi niðurlaging. Tað er sjón fyri søgn, tá stórar sparingar vóru framdar á sumri 2021, og tað longu á heysti 2023 aftur er neyðugt við stórum sparitiltøkum.

Tað er neyvan nakar annar almennur stovnur, sum hevur havt fyri neyðini at spara og fremja uppsagnir við so jøvnum millumbilum sum KvF.

Samgongan hevur í samgonguskjalinum sagt seg vilja styrkja miðlalandslagið og KvF. Hetta fegnast vit um. Vit vísa tó við hesum skrivi á, at tað eigur at verða gjørt meira framsøkið, enn fyriliggjandi lógaruppskot leggur upp til.

Tilmælini hjá okkum eru tí:

1. Prístalsjavningin í kringvarpsgjaldinum fyri persónar, sum er nevnd í lógaruppskotinum, skal fylgja gongdini í prís- og lønarstøðinum.
2. Ætlaða minkingin i kringvarpsgjaldinum frá smærri virkjum og stovnum, sum er nevnd í lógaruppskotinum, eigur at verða kompsenserað við størri gjaldi frá teimum størru virkjunum og stovnunum.
3. Kringvarpsgjaldið frá virkjum og stovnum eigur harumframt at verða prístalsjavnað.
4. Skyldan hjá likamligum persónum at rinda kringvarpsgjald eigur at verða ásett til 18 ár.

Vinaliga

Ivan Hentze Niclasen,
Stjóri, Kringvarp Føroya